Hevur tú ein spurning ella onkran trupulleika, sum tú kundi ynskt tær at fingið viðgjordan í hesum teiginum.

Spyr Sosialin

Skriva til: Sosialurin, postsmoga 76, 3800 Argir. Merk brævhjálvan »Spyr Sosialin«.



Eyðun Joensen, sálarfrøðingur



Marjun Sigurdsdóttir, sosialráðgevi



Marner Simonsen, lækni



Turið Debes Hentze, løgfrøðingur

Sosialráðgevarin:

Brennistudning

Eg eri avlamispensionistur við fullari pensión. Kundi sosialráðgevarin upplýst um, hvussu nógv kona mín kann forvinna í hægsta lagi, um vit skulu fáa brennistudning?

Eisini kundi eg hugsa mær at vita, um tað danir hava, sum kallast pleyguiskoyti, eisini er galdandi í Føroyum.

A.

Sambært løgtingslóg nr. 79 frá 1982 verður brennistudningur veittur til ávisar pensionistar og stakar uppihaldarar.

Brennistudningurin ið verður útgoldin einaferð um árið, er í lotuni kr. 1.200,—.

Treytirnar fyri at fá brennistudning eru tengdar saman við treytunum fyri at fáa pensiónsviðbót.

Tvs. at um pensionisturin ella hjúnarfelagin hava inntoku yvir kr. 11.592,— um árið (tol pr. 1.10.82) so minkar pensiónsviðbótin liðandi og fellur heilt burtur táið inntokan fer uppum **umleið** *kr. 38.000,— um árið.*

Er talan um stakan pensionist eru tolini pr. 1.10.82 ávikavist kr. 7.992,— tá fer pensiónsviðbótin so liðandi at minka. So leingi pensionisturin fær so mikið sum eina krónu í pensiónsviðbót, hevur hann rætt til brennistudning.

Eg vist eitt sindur í hvat tygum meina við »pleyguiskoyti«. Um tað er tað, sum á donskum kallast »plejetillæg«, so samsvarar tað við roktarviðbótini hjá okkum.

Avlamispensionistur, sum hevur fyri neyðini **hjálp** *frá oðrum, fyri at megna dagligu tilveruna, hevur rætt til hjálparviðbót (í lotuni kr. 1.075,— um mánaðin). Sum dømi kunnu vit nevna ein blindan pensionist.*

Avlamispensionistur, sum hevur fyri neyðini **røkt** *av oðrum, hevur rætt til roktarviðbót (í lotuni kr. 2.153,— um mánaðin).Sum dømi kunnu vit nevna ein pensionist, sum hevur sclerosis.*

Serligt umsóknarblað, ið fæst á Almannastovuni, J. Broncksgota 27, Tórshavn tlf. 15480, verður skrivað og sent Færøernes Ulykkesforsikringsråd, C. Ployensgota 1, Tórshavn saman við læknaváttan.

Hjálparviðbótin og roktarviðbótin er ikki skattskyldugar.

Marjun

Læknin:

Barnakonur og harur

Nú kemur tíðin tá menn fara at skjota haru. Eg vil fegin spyrja læknan, um tað ikki er vandamikið hjá barnakonum at koma í samband við haru? Er tað bæði áðrenn og aftaná, at hon er skotin. Mugu barnakonur hvørki gera haru til ella eta hana, tá hon er komin á døgurðaborðið?

veiðumaður

Um kvinna verður smittað av Toxoplasmosa, sum hara er smittuberari av, undir barnsferðini, so verður barnið eisini sjúkt. Hetta er ein av teimum fáu sjúkunum, sum kemur ígjognum móðurkakuna inn til fostrið. Hetta myndar seg soleiðis, at barnið fær forkálkning í heilan, og er hetta tí ógvuliga hættisligt fyri barnið.

Mamma og barnið kann verða kannað við serligari blóðroynd um vandi er fyri hesi sjúku.

Toxoplasmosa kann barnakona fáa, tá hon ger haru til.

Eitt er, at hara ber hesa smittu, men nógv verri er, at ketta eisini ber hesa. Ketta má tí undir ongum umstøðum vera í húsi, har barnakona er, tí tað er meira enn so komið fyri, at børn eru sjúk av hesum.

MS

P-pillarar og renslsótt

Fyri fimm mánaðum síðan fór eg at taka p-pillarar (Mikrogyn). Eg tók teir í triggjar mánaðir, og gavst síðan. Tá fekk eg nógv renslsótt (utflot) — hvítt og av og á gult á liti.

Eg skal tó siga, at hetta kendi eg ikki til frammanundan, og heldur ikki meðan eg tók p-pillarnar.

Halda tygum, at hetta kemur av p-pillarum, ella fer tað burtur, tá ein tíð er umliðin?

Kunnu tygum geva mær nøkur ráð móti hesum?

L.

Tað er rættuliga vanligt at fáa renslsótt í samband við p-pillarar, men vanliga fer hetta burtur aftur, tá ein gevst við at taka p-pillarar.

Tygum kunnu hava fingið onkran bruna í móðurskeiðina, og hetta kunnu tygum fáa viðgjort við onkrum slagi av stikpillarum.

Hvi summi fáa renslsótt í samband við p-pillarar, er moguliga tí hormongerðin broytist. Hetta hevur við sær, at eitt ávist sukurevni í rovini í móðurskeiðini minkar, og tí minkar ein ávis bakteria eisini, sum hevur til endamál at gera sýru. Undir vanligum umstøðum ger henda sýran, at ymsu bakteriurnar vaksa í eini javnvág, men tá sýran minkar, so fara onkrar bakteriur og soppar at vaksa ov mikið, soleiðis, at ein fær bruna og harvið renslsótt.

MS

Óregluligan opning

Í summar var eg á ferð uttanlands í nakrar vikur. Alt gekk væl til eg kom heim aftur til Føroya, men tá gjørdist eg sjúk í maganum. Eg fekk harðan maga. Tá eg hevði opning kom bert eitt sløg í senn, og tað var ikki í einum. Eg fór tí til lækna, og hann bað meg eta grovt rugbreyð, men hetta hjálpti bert stutta tíð.

Nú er sama skilið aftur og eg fari at spyrja tygum, um tað ikki er okkurt matkort, sum eg kundi etið eftir eina tíð. Kanska hevði tað hjálpt.

Hvat vilja tygum ráða mær til?

A.

Tað er ógvuliga vanligt fyribrigdi, at ólag kemur á opningin tá ein ferðast.

Hetta kann lutvist koma av, at ein kemur undir fremmandar umstøður, soleiðis at ein ikki hevur opning til vanliga tíð sum heima. Um ein brýtur vanliga vanan fleiri ferðir, kann ein koma í ti stoðu, sum tygum eru komin á.

Onnur orsøk til hetta kann vera, at maturin broytist, umframt at tað eisini hevur týdning, at ein reint sálarliga er undir oðrum umstøðum.

Fyri at koma burturúr hesum trupulleikum eiga tygum at eta grovan mat, men mest týdandi er, at tygum aftur byrja at venja tygum til at hava opning eitt ávist tíðarskeið á degnum, til hetta aftur verður ein tillærdur vani.

Fyrst at læra hetta kunnu tygum, umframt grova kostin eisini fáa heiluvág til hjálp í byrjanini.

Flestu av hesum heiluvágum hava okkurt um átta tímar at virka, so ein fær opning. Slíkur heiluvágur fæst í hondkeyp og á Apotekinum.

MS

Løgfrøðingurin:

Hvør arvar hvat?

Maður mín hevur verið giftur og eigur tvey børn í fyrra hjúnalagnum.

Hann var einkjumaður tá vit giftust fyri mongum árum síðan og eiga vit trý børn saman.

Vit hava hús og ogn felags, men við síðuna av hesum havi eg spart eitt sindur saman, at hava til at taka, tá eg um stutta tíð gevist at arbeiða.

Um eg fari hígani áðrenn maður mín, hvat hendur við sparipengum mínum. Skulu børnini hjá manni mínum hava lut í hesum pengum?

K.

Sparipeningurin er tygara og kunnu tygum gera við hann, sum tygum lystir, uttan mun til um sparipeningur tygara hoyrir til felagsogn hjá tygum og manninum.

Um tygum doyggja áðrenn maðurin, verður oll felagsogn tykkara — og eisini sparipeningurin gjørd upp. Maður tygara fær so fyrst ein hálvan part av samlaðu ognini, sum sin part. Hin helvtin verður býtt millum arvingar tygara, sum er maður (1/4) og børn tygara (3/4).

Børnini hjá manninum í fyrra hjúnarlagnum eru ikki arvingar tygara og fáa ikki lut í arvi eftir tygum.

Tá maður tygara doyr verður hansara ogn býtt við líka stórum parti til tey fimm børn hansara.

Turið

Rætta virði á virkjum??

Kann løgfrøðingurin gera so væl at svara hesum spurningum?

Herfyri varð eitt virki í Havn selt á uppboðssølu fyri 700.000 kr.

Hetta virki hevði eitt virði upp á 3,8 mill. kr.

Er ein maður, sum fer á heysin so illa vardur, at ognir hansara verða tiknar frá honum fyri smá 20% av tí rætta virðinum?

F.

Ja, — ein av vansunum við tvingsulssølu er júst, at ein noyðist at taka við tí boði, sum givið verður. Tí er ofta betur, um ein figgjarliga er so langt niður undirkomin at tvingsulssøla er høttandi, tá at royna at fáa selt ognina í frium handli í staðin.

Turið

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum teimum sum vístu samkenslu tá góða systir, mostir og fastir okkara

GUNHILD WAAG
f. 15/1-1900

doyði og varð jarðað.

Eina serstaka tøkk til tey sum vóru um hana ta síðstu tíðina.

Fyri tey avvarðandi

Einar Waag

EIN DAGIN

Ein dagin so eri eg burtur —
burtur frá øllum her,
skjótt verður gloymt tað eg gjørdi
av gerðum í hesi verð.

Eg siti og hyggi og froist —
tað vakra eg siggi herfrá,
tá sólin ið nú fer til viða —
– og eg – skjótt um deyðans á.

Eg siti og froist so sára —
og hugsi um lívið ið fór,
eg hugsi um minnir eg eigi —
og gleðin í Guði so stór.

Eg siti og takki og hugsi —
tit vóru oll góð við meg,
og eisini eg tykkum elski —
ið Guð legði á mín veg.

Ein dagin ð eg siti og hyggi
skjótt burtur er hendan sjón,
ein dagin eg liggi í moldum –
hvar var tá mín einasta vón?

Mín einasta vón og gleði —
er Hann ið hekk krossi á,
mín einasta vón og gleði —
er Hann — tá eg fari herfrá.

G.W.

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag:

Eykaaðalfundur

Dagsskrá:
1: Støðutakan til uppskotið um nýggja lóg fyri felagið
2: Støðutakan til reglugerð fyri valgrunnin
3: Ymiskt

Stað og tíð:
Í húsum Føroya Arbeiðarafelags í Stoffalág, kl. 19.30.
Ein kaffimunnur verður at fáa.

SSJ